## Bara ein burturflytari

Natascha Kampusch, sum sat fangi í einum kjallara í Wien í átta ár, avsannar gitingar um, at burturflytari hennara, Wolfgang Priklopil, fekk hjálp frá einum øðrum manni. Natascha Kampusch var 10 ára gomul, tá hon bleiv burturflutt í 1998, og eitt vitni vil vera við, at tað vóru tveir menn, sum koyrdu hana inn í ein vøruvogn. Eysturríkska løgreglan hevur avhoyrt ein mann, sum kann hava verið hjálparmaður, men hann er tó ikki skuldsettur. Men hann er ósekur, sigur Natascha Kampusch, tí Wolfgang Priklopil var einsamallur um burturflytingina, sigur hon við sjónvarpið OFR2.



## Heldur fisk enn olju

Í Noregi eru fólk misjøvn á máli um, hvørt tað er rætt at fara undir oljuvinnu við Lofoten og Vesterålen, tí talan er um sera týdningarmiklar fiskileiðir. Í síðstu viku segði Statoil-stjórin, Hege Norheim, at fiskifrøðingarnir hava verið ógreiðir, tá teir eru spurdir, men tað avsannar Ole Arve Misund, stjóri á havrannsóknarstovuni. Í hansara eygum er eingin ivi um, at Lofoten og Vesterålen eiga at vera fiskileiðir heldur enn oljuleiðir. Hann sigur við Lofotposten, at eitt óhapp við oljudálking hevði fingið sera álvarssamar avleiðingar fyri fiskin á leiðunum, sum eru týðandi gýtirnarleiðir.



*Hetta er ein av teimum góðum døgunum hjá Agnari Nielsen, sum í dag er 82 ára gamalur. Hendan dagin fekk hann tríggjar hemarar, einsamallur á báti*

# 82 ára gamal er bitin av hemaraveiði

**Agnar Nielsen, sum mong munnu kenna frá tíðini, tá hann sat á løgtingi, er í dag 82 ára gamal. Síðan hann fór úr politikki, hevur hann havt góðar stundir til ymisk ítrív, og fremsta ítrivið hjá vestmenninginum er báturin**

VEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú so nógv verður gjørt burtur úr teimum, sum veiða hemara við tráðu, hevur lítið verið at hoyrt um allar teir hemararnar, sum Agnar Nielsen í Vestmanna hevur fingið seinnu árini og hevur ført til lands.

Hjá einum 82 ára gomlum manni er tráðuveiða eftir hemara næstan vónleys, tí tað tekur langa tíð og er nógv knoss at fáa ein hemara upp til bátin, sum tú ført á tráðu. Tað tekur soleiðis eisini langa tíð, áðrenn tú hevur fingið lívið av einum so stórum fiski.

Agnar roynir tí í staðin við trimum hemarahúkum, sum hann hevur hangandi niður úr eini boyðu, sum hong-ur aftur úr bátinum.

Leiðirnar, honum dámar best, eru leiðirnar út fyri Barinum, og veiðan eydnast best, tá streymviðurskiftini eru til vildar, og árstíðin er hin rætta.

Hendan dagin, myndirnar eru tiknar, fekk Agnar Nielsen ikki færri enn tríggjar hemarar.

Hann er altíð einsamallur á báti, og tí er einki at ivast í, at hesin dagurin hevur verið eitt ordiligt knoss hjá einum 82 ára gomlum manni.

Tað er ikki altíð sum at siga tað at fáa bilbukt við hemara, og er rákið ov hart, tá hann tekur, noyðist hann viðhvørt at sigla við hesum stóra fiski afturút, til hann kemur inn á betri rák.

Til tess at gera ”sleipið” so varisligt sum gjørligt, hevur Agnar fingið sær fatur á einari bilslangu, sum hann bindur millum bátin og hemaran, so vandin fyri at missa fongin gerst tað minni.

Men Agnar er væl fyri, og sjálvur hevur hann sagt, at tá hann hoppar aftur og fram, kemum honum viðhvørt til hugs, at hann kanska átti at ansa eitt sindur betri eftir sær, nú hann er farin um tey áttati.

Agnar er í bátinum hvørja løtu, sum høvið býðst, og tað er rættiliga ofta, tí báturin er hansara lív, nú hann eldist.

Agnar Nielsen ger eisini nógvar túrar við kalvalínu millum ár og dag.

# Trý línuskip landaðu í Klaksvík í gjár

**Landingarmiðstøðin í Klakvík hevur seinastu dagarnar landað fýra línuskip, harav tey trý landaðu í gjár og hitt fjórða leygardagin**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár landaðu trý línuskip í Klaksvík.

Jákup B og Klakkur, sum hava roynt undir Føroyum, høvdu góð 80.000 og sløk 80.000 pund í part og Helena, sum hendan túrin var undir Íslandi, hevði sløk 93.000 pund.

Línubáturin Kvik landaði í Klaksvík leygardagin, og hann hevði sløk 70.000 pund. Teir høvdu eisini verið undir Íslandi.

Úr Klaksvík verður sagt, at stórur partur av veiðini hjá línubátunum, sum royna undir Føroyum, er toskur, meðan teir, sum royna undir Íslandi, serliga fiska longu og brosmu.

Seinni í hesi vikuni vænta tey Fugltúgvuna, sum hendan túrin er undir Íslandi.

Útróðrarbátarnir í Klaksvík loysa, tá roynandi er, og streymurin er til vildar.

Á Landingarmiðstøðini í Klaksvík, sum landar hesar bátar, siga tey, at útróðurin hevur verið hampiligur higartil í heyst.

Vanliga plagar útróðurin at batna so hvørt, sum tað kólnar, og tí vóna menn, sum royna við línu, at veturin, sum stundar til, fer at roynast.



*Klakkur landaði sløk 80.000 pund í Klaksvík í gjár*

Mynd: Vilmund Jacobsen